


# Fakta um Skálafjarðartunnilin

## Um P/f Skálafjarðartunnilin

P/f Skálafjarðartunnilin er eitt privat partafelag. Eigarar eru LÍV og Kaupthing Bank, ið eiga hvør síni 50 prosent av felagnum. Tá ið partafelagið upprunaliga skuldi stovnast var hugsanin, at kommunurnar, tunnilin bindur saman, skuldu verða partaeigarar. Tað lat seg tó ikki gera løgfrøðisliga. Hugskotið um Skálafjarðartunnilin tók seg upprunaliga upp millum einstaklingar.

## Um ferðsluna

Av góðum grundum ber ikki til at siga nágreiniliga, hvussu ferðslan verður gjøgnum Skálafjarðartunnilin. Framtíðar ferðsla er tengd at fleiri ymiskum faktorum. Bústaðarmynstur, arbeiðspláss, samfelagsgongd, nýtslugjaldi fyri at brúka tunnilin og alternativum samferðslumøguleikum. Tað ber tó til at gera eina rættiliga neyva meting, grundað á somu viðurskifti, sum eru nevnd omanfyri.

Metingarnar hjá P/f Skálafjarðartunlinum vísa, at ferðslan í 2014 vil vera uml. 4000-4500 akfør um dagin norður og suður. Tilsvarandi vil ferðslan eystur - vestur vera uml. 1400-2100 akfør um dagin. Tíðin arbeiðir fyri Skálafjarðartunnilin. Kanningar vísa, at í tíðarskeiðinum frá 2014 til 2034 vil ferðslan vaksa við umleið 50%.
Metingarnar eru við tí fyrivarni, sum takast má, tá ið talan er um framtíðarmetingar.



Rundkoyringin inni í Skálafjarðartunlinum



Tilkoyringin á Sundi á kvøldi



Rundkoyringin við Løkin á kvøldi



Tilkoyringin á Sundi á kvøldi

Skálafjarðartunnilin







Talvan vísir fyrireikingararbeiðið higartil og tíðarætlanina fyri arbeiðið við undirsjóvartunlinum. Tíðarætlanin fyri komandi árini er treytað av, at viðgerðin hjá politiska myndugleikanum (reyðu feltini) verður raðfest høgt. Politiska viðgerðin er ein treyt fyri, at verkætlanin kann halda fram. Somuleiðis er viðgerðin hjá friðingarmyndugleikunum umráðandi.

Svarta brotastrikan markerar tíðarskeiðið august/september 2007, tá ein endalig greiða skal verða funnin, um tíðarætlanin skal halda.

## Fakta um farleiðina

Longd á høvuðstunli 7,1 km.
Longd á vestara greintunli 2,1 km.
Longd á eystara greintunli 1,8 km.
Samlaða longdin á øllum vegastrekkjum í Skálafjarðartunlinum er 11.175 m.
Stødd á rundkoyring (tvær breytir) 59 m.

Tríggjar koyribreytir (13 m.) vera gjøgnum tunnilin.

Samlaði kostnaðurin av allari verkætlanini er mettir til at vera umleið 900-1000 milliónir krónur.


Økið við Løkin


Rundkoyringin við Løkin sædd úr erva


Rundkoyringin á Strondum sædd úr erva


Tilkoyringin á Strondum


Rundkoyringin á Sundi sædd úr erva


Rundkoyringin á Sundi

Skálafjarðartunnilin